# Tilmæli frá Fiskidaganevndini
# til
# landsstýrismannin í fiskivinnumálum
# fyri
# fiskiárið 2004/2005

# INNIHALDSYVIRLIT:


| | Síða |
|---|---|
| **1. Inngangur** | **3** |
| **2. Tilmæli:** | **4** |
| **2.1. Endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap** | **4** |
| **2.2 Fiskidagaskipanin skal umfata alla botnfiskaveiðu á føroyskum øki** | **4** |
| **2.3. Smábátar sum reka frítíðarfiskiskap út úr fiskidagaskipanini** | **5** |
| **2.4. Umsetiligheit av fiskidøgum má skipast betur – fiskadagamarknaðu** | **5** |
| **2.5. Støðan hjá fiskastovnunum á einum vanligum støði** | **5** |
| **2.6. Veiðan á Føroya Banka skerjast og eingin veiða í gýtingartíðini** | **6** |
| **2.7. Sama dagatal fiskiárið 2004/2005** | **7** |
| **3. skjal 1: Metingar hjá ymisku skipabólkunum um støðuna í teimum einstøku fiskastovnunum** | |
| **4. skjal 2: veiðihagtøl** | |

# 1. Inngangur

Fiskidaganevndin er sett við heimild í § 5 stk. 9 í løgtingslóg nr. 28 um vinnuligan fiskiskap frá 10. mars 1994, við seinni broytingum.

**Uppgávan** hjá Fiskidaganevndini er at lata landsstýrismanninum metingar um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið.

Limir í nevndini eru: Óli Samró, formaður, Bjarni Kass: Trolskip, Jens Jacob Olsen: Trolbátar, Chris Jan Michelsen: MÚ, Rólant Poulsen: Línuskip, Eyðun Johannesen: FF. Skrivari í nevndini er Hertha Olsen.

Asbjørn Djurhuus hevur luttikið á tveimum fundum fyri MÚ, og Auðunn Konraðsson hevur luttikið á trimum fundum fyri MÚ. Dánjal Jacobsen hevur luttikið á tveimum fundum vegna trolskip. Karl Isaksen hevur luttikið á tveimum fundum og Óli Jacobsen hevur verið á tveimum fundum fyri FF.

Nevndin hevur havt kunnandi fundir í oktober, januar, mars, apríl og í mai. Í mai og juni hevur verið arbeitt við endaliga álitinum.

Fleiri av tilmælunum eru tey somu sum undanfarnu tvey árini. Víst verður til útgreinaðu grundgevingarnar í tilmælunum 2002/2003 og 2003/2004.

Í brævi dagført 2. juni 2004 heitir Fiskimálastýrið á Fiskidaganevndina um at viðgera ásetingina av fiskidøgum á Føroya Banka sum eitt mál fyri seg. Fiskidaganevndin hevur viðgjørt málið á fundunum 17. og 18. juni. Hetta er stutt skotbrá at ummæla eitt slíkt stórmál, og tað hevur verið avmarkað, hvat tilfar hevur verið møguligt at savna og viðgera. Vit vilja hervið geva Fiskimálastýrinum eina viðmerking til fyrispurningin.

Minnilutin Jens Jacob Olsen, vegna trolbátar, tekur undir við fiskidaganevndini, men ynskir hesar broytingar í skipanini:

1. Trolbátarnir í bólki 4A og 4B fáa fleiri dagar, tí teir fiska einans 4 % av toski
2. At tað verður frítt at handla dagar í bólki 4 millum trol og húk

# 2. Tilmæli:

### 2.1. Endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap

Skipanin við fiskidøgum hevur virkað í átta fiskiár. Mælt verður til, at øll lógin um vinnuligan fiskiskap verður endurskoðað til fiskiárið 2005/06.

Lógin um vinnuligan fiskiskap - og serstakliga skipanin við fiskidøgum - er ein góð skipan, sum er væl egnað til fiskiskap undir Føroyum.

Royndirnar av skipanini eru, at lógin um vinnuligan fiskiskap ofta er ógreið, serliga í samband við umsitingina av skipanini - hóast fleiri mannagongdir og kunngerðir eru komnar við nærri ásetingum.

Vit mæla tí til, at sjálv lógin um vinnuligan fiskiskap verður gjøgnumgingin og eftirmett. Endamálið er, at lógin skal gerast greiðari hjá vinnuni og myndugleikunum at virka undir, tá lógarteksturin er gjørdur greiðari.

### 2.2. Fiskidagaskipanin skal umfata alla botnfiskaveiðu á føroyskum øki

Fyri triðju ferð mælir nevndin staðiliga til, at allur fiskiskapur eftir botnfiski kring Føroyar verður skipaður innan fiskidagaskipanina. Eingi veiðiøki og eingir skipabólkar eiga at vera undantikin.

Sjálvt logiska grundarlagið fyri fiskidagaskipanini er, at allur fiskiskapur innan eitt avmarkað øki verður skipaður innan sama fiskiveiðubygnað. Nevndin metir, at logiska grundarlagið undir fiskidagaskipanini ridlar, tá týðandi veiða á sama avmarkaða øki er skipað eftir fleiri skipanum. At blanda eina kvotaskipan við nøgdaravmarking og óavmarkaðan fiskiskap á somu leið, sum fiskidagaskipanin er galdandi, kann beinleiðis taka grundarlagið undan fiskidagaskipanini.

Tí mæla vit til, at bólkur 1, sum er djúpvatnstrolarar, og eisini bólkur 6, sum er garnaskip, koma undir skipanina. Vit mæla til, at fiskadagatalið verður økt samsvarandi tí veiðu, hesir bólkar hava havt rættindi til. Serrættindi fyri tosk og hýsu eiga at verða viðgjørd í hesum sambandi. Dagaskipanin verður ásett fyri allar leiðir innan fyri føroyska fiskimarkið. Vit mæla til, at djúpvatnstrolararnir koma inn í skipanina sum djúpvatnstrolarar og ikki sum ein bólkur, sum økir veiðutrýstið á innaru leiðunum. Heldur ikki eiga garnaskipini at økja um veiðutrýstið á innaru leiðunum.

Nevndin sær ongar forðingar fyri, at at ytru leiðirnar skulu gerast minni áhugaverdar fyri djúpvatnstrolararnar ella garnaskipini innan fiskidagaskipanina. Tað er ein spurningur um vektan av døgum eftir leiðum, eins og galdandi er fyri hinar skipabólkarnar, serliga partrolararnar.

Vit mæla til, at umboð fyri djúpvatnstrolararnar og garnaskipini verða vald í Fiskidaganevndina, tá bólkarnir koma inn í fiskidagaskipanina.

Fiskidaganevndin hevur havt fund við umboð fyri bólk 1 (djúpvatnstrolararnar) og bólk 6 (garnaskipini) 18. mars 2004. Niðurstøðan var greið, at hvørgin bólkurin hevði nakað ímóti at vera ein partur av fiskidagaskipanini. Tað avgerandi fyri bólkarnar var, hvørjar treytirnar fyri at koma við í skipanina vóru.

Vit vilja heita á Fiskimálaráðharran um skjótast møguligt at taka upp samráðingar við umboð fyri djúpvatnstrolarar og garnaskip eins og umboð fyri bólkarnar innan skipanina so tilgongdin til at teir eisini blíva ein partur av fiskidagaskipanini kann byrja sum skjótast. Vit heita á Fiskimálaráðharran um at bera so í bandi, at hesir skipabólkar longu fiskiárið 2004/05 eru ein partur av fiskidagaskipanini.

## 2.3. Smábátar sum reka frítíðarfiskiskap út úr fiskidagaskipanini

Vit mæla til, at fiskidagaskipanin einans fatar um vinnuligan fiskiskap. Vit mæla til at ein onnur skipan bygd á annað lógargrundarlag enn lógina um vinnuligan fiskiskap verður gjørd fyri tey før, sum reka frítíðarfiskiskap.

Aftur í ár mæla vit til, at teir minstu bátarnir í bólki 5, sum ikki reka vinnuligan fiskiskap, verða tiknir út úr fiskidagaskipanini.

Vit mæla til at umsitingin í størri mun verður nýtt til tann vinnuliga fiskiskapin.
Tá tað stóra talið av smábátum í bólki 5 fara út úr skipanini, minkar talið á vinnuligum veiðuførum í bólki 5 munandi – fiskiárið 2003/04 úr uml. 1.000 niður á uml. 180.

## 2.4. Umsetiligheit av fiskidøgum má skipast betur - fiskadagamarknaður

Umsetiligheit er í samband við keyp og sølu av fiskidøgum og rættindum!

Ein fyritreyt fyri eini sunnari tillaging er, at ein **marknaðarskipan** er galdandi. Grundarlagið fyri eini marknaðarskipan er opinleiki og kunnleiki. Tí eigur tað at verða møguligt hjá teimum, sum hava áhuga, at síggja skrásettu nýtsluna av fiskidøgum eins og yvirlit yvir, hvør eigur loyvini.

Ásannast má eisini, at stór óvissa og ónøgd mangan hava verið um handil við loyvum og døgum.

Vit mæla til, at umsetiligheit av fiskidøgum heldur fram, tó broytt til síðstu seks mánaðirnar av fiskidagaárinum, (bólkur 5 undantikin).

Vit meta, at umsetiligheit av døgum millum bólkar kemur at virka betur, um allir skipabólkar og allar leiðir eru umfatað av fiskidagaskipanini.

**2.5. Støðan hjá fiskastovnunum á einum vanligum støði**

Nevndin metir, at toskurin, hýsan og upsin sum heild ikki eru eins væl fyri í ár sum undanfarnu trý árini. Fiskiskapurin seinasta árið er komin á eitt meira vanligt støði í mun til tað óvanliga høga støðið, fiskastovnarnir hava verið á seinastu trý till fýra árini.

Toskur
Minni er til av toski á øllum leiðum. Støddin er minni, og toskurin er meira rak, enn hann hevur verið seinastu trý árini.

Hýsa
Aftur í ár hevur óvanliga nógv hýsa verið at fingið og sæð á øllum leiðum. Stóra hýsan er rak, meðan tann smáa hýsan er sum heild væl fyri til fiti.

Upsi
Nógv er til av upsa á øllum leiðum. Men meginparturin er smáur upsi; upsin er nøkunlunda fyri sum eitt miðalár.

Nevndin hevur ta fatan, at ymisku fiskasløgini kunnu vera ymiskt fyri, eftir hvørjum leiðum hugt verður eftir, og kunna eisini vera ymiskt fyri gjøgnum árið. Sum kunnugt er fiskidaganevndin sett saman av fólki, sum hevur sítt yrki á sjónum. Fyri betur at kunna meta um støðuna hjá stovnunum hevur nevndin á fundum gjøgnum árið viðgjørt støðuna fyri tey ymisku fiskasløgini. Í skjali 1 er nærri lýst, hvussu tey ymisku fiskasløgini eru fyri til stødd, fiti og æti. Metingin er gjørd fyri hvønn einstakan skipabólk í fiskidagaskipanini og tær leiðirnar, hesir bólkar fiska á.

Sum dømi kann nevnast, at toskur fiskaður við línu somu viku kann vera sera ymiskur eystanfyri og vestanfyri - í mei var toskurin væl fyri til fiti vestanfyri, men sera rak eystanfyri.

**2.6. Veiðan á Føroya Banka skerjast og eingin veiða í gýtingartíðini**

Vit meta, at royndin fiskiárið 2003/2004 var ov stór í mun til, hvat Føroya Banki tolir.

Fyrst og fremst mæla vit til, at Føroya Banki verður friðaður í gýtingartíðini.

Harumframt vilja vit mæla til, at samlaða dagatalið á Føroya Banka verður minkað við 10 % í mun til tey givnu loyvini fiskiárið 2003/04.

Vit vilja heita á fiskimálastýrið um at skipað fiskiskapin á Føroya Banka betur. Okkara fatan er, at loyvir hjá førum í bólki 4, sum ikki hava roynt á Føroya Banka í fleiri ár, eru blivin umsett serliga til veiðufør í bólki 4, sum hava støddina til bólk 3, eins og beinleiðis til bólk 3. Sagt við øðrum orðum, eru loyvir frá útróðrarbátum, sum royna við húki, seld línuskipum. Á tann hátt er veiðutrýstið farið langt upp um tað, vit meta er hóskandi.

Vit mæla í fyrsta lagi til, at skipanin av veiðuni á Føroya Banka verður tikin upp til nýggja viðgerð. Fiskidaganevndin er sinnað at vera við til at viðgera og gera uppskot til skipan av fiskiskapinum á Føroya Banka.

**2.7. Sama dagatal fiskiárið 2004/2005**

Nevndin mælir til at halda sama fiskidagatal komandi fiskiár fyri teir bólkarnar, sum **nú** eru fevndir av fiskidagaskipanini.

Hóast fiskastovnarnir eftir okkara meting sum heild ikki eru eins væl fyri, sum teir hava verið undanfarnu nógvu árini - so vilja vit tó ikki mæla til broyting í fiskidøgunum. Hetta er grundað á, at nevndin metir fiskidagaskipanina at vera eina langtíðar javnvágarskipan, har fiskidagatalið ikki skal stillast á hvørjum ári – hvørki upp, tá nógvur fiskur er, ella niður, tá minni er til.

Fiskidagaskipanin skal nú standa sína roynd. Fiskadaganevndin er samd um at halda eitt støðugt dagatal, og vit vilja heita á Fiskimálastýrið um neyvt at umsita veiðuloyvini og fiskiloyvini.

Vegna Fiskidaganevndina

22.06.04

__________________

Óli Samró, formaður